# Terji og kettlingarnir til Danmarkar




*Fløgan Terji & Kettlingarnir hevur selt yvir 1000 eintøk í Føroyum*

**Barnafløgan Terji & Kettlingarnir kom út í november mánaða. Fløgan hevur ikki fingið so nógva umrøðu í fjølmiðlunum, men hóast tað, so varð fyrsta uppleggið uppá 1000 fløgur útselt til jólar. Nú vísir tað seg, at fløgan er á veg til Danmarkar, har hon skal út á danska marknaðin við donskum teksti, men sama tónleiki**

FLØGUÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Terji og Kettlingarnir. Ein fitt føroysk barnafløga við 13 løgum og harafturat er ein søga í endanum um eina kettu, sum fangar mýs á løgmansskrivstovuni, og harumframt kann hon eisini nýtast til teldur. Stjórin á fyritøkuni DCM, sum hevur staðið fyri at prenta fløgurnar, hevur nú sett seg í samband við Terja Rasmussen, tí hann hevur áhuga í at geva sangirnar út í Danmark við donskum teksti, men tónleikinum hjá Terja.

– Eg má siga, at eg gjørdist heilt kløkkur tá hann ringdi, sigur Terji Rasmussen. – Tær ferðirnar eg havi verið við til at givið eina fløgu út, havi eg ongantíð havt nakað samband við teir sum prenta og gera fløgurnar. Vit senda bara tilfarið niður og so taka teir sær av restini.

### Rugbreyð, ikki candyfloss

Stjórin í DCM sigur, at hann hoyrir, at tónleikurin er rugbreyð, og ikki candyfloss. Hann er ikki sum hinar døgnflugurnar – góðs er í. Hann skilti ikki tekstin sjálvandi, men hann hevði spælt fløguna umaftur og umaftur heima, og eisini roynt hana fyri børnunum í familjuni, og tað vísti seg at rigga fínt.

– Tað er DCM, ein lýsingarfyritøka og Flemming Hanson, ið hava ætlanir um at gera eitt plátufelag, og ætlanin er tí at byggja felagið upp rundan um hesa fløguna. Terji & Kettlingarnir skal so vera fyrsta fløgan teir geva út, greiðir Terji frá. – Anker Eli, sum saman við mær gjørdi søguna til fløguna, er nú farin í holt við at umseta og umskriva tekstin. Nú gongur søgan fyri seg í kanalunum í Keypmannahavn ístaðin fyri í Sandageri, og fangar kettan mýs á Christiansborg ístaðin fyri á løgmansskrivstovuni.

### 20.000 eintøk og trý videoløg

Málið er at selja 20.000 eintøk av fløguni í Danmark. Alt annað verður roknað fyri ein fiasko. Minst eitt videolag skal gerast, men helst trý.

– Hetta er ein millióna íløga, greiðir Terji frá. – Í Føroyum er tað soleiðis, at allar fløguverkætlanir sum fara í gongd eru rættiliga bíligar. Líkamikið hvat tú gert, so er tað ein so lítil íløga sum møguligt, og tað skal gerast so skjótt sum møguligt. Danir duga als ikki at skilja, at føroyingar klára at gera fløgur fyri so lítið av peningi. Ein fløguútgáva kostar millum 100.000 og 200.000 krónur í Føroyum.

Ætlanin er, at fløgan skal koma út antin í ár ella fyrst næsta ár. Tónleikurin skal ikki gerast umaftur, men bara røddirnar syngjast inn á nýggjum av donskum børnum. Terji skal helst sjálvur syngja sangirnar, sum hann syngur á føroysku fløguni harímillum Hodja úr Pjort, og James skal eisini syngja Hundalív, sum hann syngur á fløguni.

Ikki er rættiliga vist enn nær fløgan kemur út. Talan er helst um seinni í ár, ella fyrst í næsta ári.



*Tónleikurin hjá Terja Rasmussen kemur nú út á danska marknaðinum. Tónleikurin er tann sami, men sangurin verður á donskum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*


Laaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær, bæði til gaman og álvara. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu frálíku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum.

Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

**Íroknað er** flogferð, fýra nætur á dupultkamari við morgunmati og ferðaavgjøld.
Tilboðið er galdandi til 1. apríl.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 19.00.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways
www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355




# Fekk so vánaliga byrjan sum hugsast kundi

**Rækjurolarin hjá vágbingum, Hvannaberg fekk eina sera tunga byrjan og nú er veðrið so ringt við Svalbard, at óvist er, nær hann fer avstað aftur.**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað var við ikki sørt av bjartskygni, at menn seinasta summar tóku seg saman at keypa ein rækjutrolara afturat í føroyiskaflotan.

Men tíverri hava vónirnar ikki hildið, tí Hvannaberg hevur fingið so ringa byrjan, sum hugsast kundi.

Tað vil siga, at tað allarfyrstu tíðina sá væl út.

– Hvannaberg fór til fiskiskap í juli og longu síðst í august var hann í Føroyum við fullari last, 235 tonsum, sigur Jákup Olsen, reiðari.

Men síðani hevur gingið av skriðuni.

Fyrst hendi tað, at Hvannaberg fekk maskinbrek og lá í vikur í Svalbard og bíðaði eftir eykalutum. Og tá í hann fórut aftur, kom hann at liggja fastur í ísi í langa tíð.

– Veðrið við Svaldbard hevur verið heilt óvanligt, tí ísurin kom longu í november,. Hetta komst, at hann lá av útnyrðingi í fleiri vikur út í eitt og tað førdi ísin við sær. Annars plagar ísurin ikki at koma, fyrrenn nú í januar og februar

Jákup Olsen sigur, at avleiðingin av tí hevur verið, at síðani í august, hevur Hvannaberg bara avreitt tvær lítlar lastir uppá eini 70 tons hvør.

– Á veg heim, gekk maskinan aftur fyri og nú hevur skipasýnið kravt, at motorurin verður tikin í botn.

Jákup Olsen sigur, at tí hevur báturin ligið á Havnini í eina tíð, men tað arbeiðið er liðugt nú.

– Ætlanin er at royndarkoyra motorarnar í dag.

Nær Hvannaberg fer avstað aftur, er óvist.

– Vit hava bara leiðirnar við Svaldbard at royna á og har eru ikki líkindi hjá so lítlum báti sum Hvannaberg hesa árstíðina.

Reiðarin sigur, farið verður tískil ikki avstað, fyrrenn líkindini eru betri.

– At fara upp til Svaldbard at leggja seg fastan í ísi, tænir ongum endamáli, tí tað er bara at brenna olju. So kunnu vit tað sama liggja í Føroyum, sigur hann.

Jákup Olsen avsannar sostatt eisini tíðindini um, at Hvannaberg longu skal vera lagdur sum tann fyrsti trolarin í hoyknar undan í kreppuni í rækjuflotanum.

– Vit liggja, tí vit hava umvælt motorin Og vit fara, tá ið líkindi eru til tess, sigur hann.

### Mugu hava tíðaravmarkan stuðul

Men Jákup Olsen viðgongur, at støðan hjá Hvannaberg er spent, eins og hjá øllum hinum rækjutrolarunum, tí fiskiskapurin hevur verið lítil og prísiurin sera lágur.

Tí heldur hann, at Landsstýrið eigur at umhugsa at lata bátunum ein tíðaravmarkaðan stuðul, eitt nú til at keypa olju fyri.

– Ella er støðan tann, at vit vilja aftur í ta støðu sum var fyri nøkrum árum síðani, tá ið ein stóru partur av okkara nýggjastu skipunum vórðu latin av landinum fyri onki. So kunnu politisku myndugleikarnir saktans sóla sær í, at teir hava eina greiða støðu, men spurningurin er, hvat teir fáa burturúr tí, tá ið avtornar.

Hann vísir á, at í øllum londum verður stuðul latin av ymsum slagi fyri at halda vinnuni gangandi, men mangan er hesin stuðulin krógvaður meiri og minni, ikki minst í ES.

– Vit liva ikki av stuðuli, men hetta er ein partur av okkara høvuðsvinnu okkara og tað nyttar onki at kappa vinnuna av um knøini, tí viðhvbørt er neyðugt at stuðla í eina tíð fyri at ein vinna ikki skal missa fótafestið, sigur Jákup Olsen.

– Heldur hendan støðan fram, gongur tað ikki leingi afturat, leggur hann afturat.



*Rækjutrolarin Hvannaberg úr Vági fekk eina stak óhepnað byrjan, men nú er motorurin høvuðsumvældur og nú verður bíðað eftir líkindum at fara nýggjan túr*

# Vilja hava skrivstovu at umsita umhvørvismál á Tvøroyri

**Verður skrivstovan, sum skal umsita Lokal Agenda 21 umhvørvisætlanini, løgd í Havn, vil Tvøroyrar Kommuna ikki gjalda**

ÚTJAÐARAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*

Tann nógv umrødda "Lokal Agenda 21" ætlanin er ikki longur bara ein spurningur um umhvørvið. Nú er tað eisini blivið ein spurningur um útjaðarapolitikk.

Á Býráðsfundi á Tvøroyri mánakvøldið var spurningurin um Lokal Agenda 21 til viðgerðar. Lokal Agenda 21 er tað landsumfatandi samstarvið á umhvørvisøkinum, sum ætlanin er at fáa á føtur í Føroyum.

Eftir býráðsfundin mánakvøldið er tað púra greitt, at tað verður ikki treytaleyst, at Tvøroyrar Kommuna fer upp í Lokal Agenda 21 samstarvið.

Endamálið er at seta eina Agenda 21 skrivstovu á stovn. Ætlanin er, at hvør kommuna skal betala 8,50 fyri hvørt fólkið í kommununi til hesa skrivstovuna og so skal Landsstýrið betala tað sama.

Tvøroyrar Byráð hevði gjaldið til viðgerðar mánakvøldið og har varð samtykt at taka undir við tí, men undir ávísum treytum.

Tvøroyrar Kommuna samtykti at betala 8,50 krónur til eina Lokal Agenda 21 skrivstovu, men Býráðið vildi samstundis hava, at skrivstovan skuldi leggjast á Tvøroyri, har høli eru tøk til endamálið.

Fæst ikki semja um, at skrivstovan skal leggjast á Tvøroyri, vil Býráðið í øðrum lagi góðtaka, at hon verður løgd onkra aðrastaðni í útjaðaranum í Føroyum.

Men Tvøroyrar býráð samtykti eisini, at verður skrivstovan løgd í Havn, vil Tvøroyrar Kommuna ikki gjalda til hana.

Gjaldið, sum Tvøroyrar Kommuna skal betala, er 16.000 krónur.

Annars varð upplýst á býráðsfundinum, at skrivararnir í Kommunusamskipan Føroya hava róð framundir, at LokalAgenda 21 skrivstovan skal leggjast saman við skrivstovuni hjá Kommunusamskipanini í Havn, men tað góðtekur Tvøroyrar Býráð sostatt ikki.

Býráðið sigur, at tað, at leggja skrivstovuna uttanfyri Havnina er ikki annað enn fult í samsvari við útjaðarapolitikkin hjá samgonguni.

Eftir ætlan skal eitt fólk arbeiða á skrivstovuni í fyrstu syftu og at gerast skal ein fimm ára sáttmáli, har kommunurnar betala 8,50 fyri hvørt fólk í kommununi og landið tað sama.

Men hvussu Agenda 21 umsitingin fer at síggja út eftir tað, var óvist og tað vóru býráðslimir á Tvøroyri, sum væntaðu, at hon fór at veksa.

Lokal Agenda 21 skrivstovan verður ein umsiting, sum skal hjálpa og vegleiða kommununum í umhvørvismálum og ætlanin verður sett í verk sambært altjoða umhvørvisavtaluni, sum varð umdirskrivað í Rio de Janeiro í 1992, men tað er ikki fyrrrenn nú, at Føroyingar hava tikið stig til at gera eftir avtaluni



*Tað verður ikki treytaleyst, at Tvøroyrar Kommuna fer at gjalda sín part av teirri nógv umrøddu Lokal Agenda 21 samstarvinum á umhvørvisøkinum*

# Børn á Tvøroyri tryggjað

TRYGGING
*Áki Bertholdsen*

Nú eru øll børn, sum eru í barnaansingini á Tvøroyri tryggjað.

Tað hava tey ikki verið og eftir at onkur hevur gjørt vart við tað hjá býráðnum, hevur umsitingin kannað málið.

Býráðið kom eftir, at tað var rættast at børnini, sum eru í dagrøkt, eru tryggjað, tí í løtuni er tað ongin trygging sum tekur við, um eitt óhapp skuldi hent og okkurt barn brýtur sær brillurnar, brýtur tenn, ella um álvarsligir skaðar henda.

Talan er um 153 børn, sum tilsamans eru í barnagarði, dagrøkt ella í frítíðarskúlanum.

Býráðið hevur fingið eitt tilboð frá tryggingini um at tryggja øll børnini.

Hetta er ein trygging, sum kostar kommununi 11.500 krónur um árið. Men afturfyri veitir tryggingin upp til 500.000 krónur í endurgjaldi , um eitt barn verður avlamið, hon letur upp til 25.000 krónur í endurgjaldi fyri tannskaðar og 17.000 krónur í endurgjaldi um eitt barn doyr.